UNDIRVÍSINGAR- OG MENTAMÁLASTÝRIÐ
FÓLKASKÚLADEILDIN

# Reglur um ráðlegging av undirvísingini

Samsvarandi § 21 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan verða hesar reglur ásettar.

**§ 1.** Flokslærarin skal í samráð við lærarar floksins og við atliti at undirvísingarætlan skúlans ráðleggja undirvísingina komandi skúlaár.

*Stk. 2* Ráðleggingin fatar um sjálva undirvísingina, og grundgevast skal fyri vali av arbeiðshættum/arbeiðsformum, undirvísingarevnum og undirvísingarmiðlum. § 21, stk. 1a.

*Stk. 3.* Ráðleggingin skal, umframt at verða lagað til tørv og fortreytir hjá tí einstaka næminginum, eisini verða lagað til flokkin sum heild. § 21, stk. 2 b.

*Stk. 4.* Ráðleggingin skal verða skipað soleiðis, at næmingarnir fáa líkindi at nema sær fakliga djúphugsan, høpi og heild, eins og tað skal verða fyrireikað soleiðis, at teir fáa høvi at nýta og menna kunnleika og fimi við undirvísing í tvørgreinaligum evnum og spurdómum. § 5, stk. 1.

**§ 2.** Flokslærarin saman við lærarum floksins ráðleggja og fyrireika undirvísingina soleiðis, at allir næmingar fáa sínar avbjóðingar. § 21, stk. 2.

*Stk. 2.* Í dagligu undirvísingini samarbeiða næmingur og lærarar javnan um at áseta tey mál, roynt verður at náa. § 21, stk. 4 a.

*Stk. 3.* Øll ráðleggingin skal samsvara við endamálsgrein fólkaskúlans.

**§ 3.** Tað áliggur leiðslu skúlans at tryggja, at henda ráðlegging er tøk til 15. september í hvørjum skúlaári. § 21, stk. 2.

Undirvísingar- og Mentamálastýrið
Fólkaskúladeildin

3. februar 2000

Hensar Ellingsgaard
*deildarstjóri*

FALKAVEGI 6 • POSTRÚM 3279 • FO-110 TÓRSHAVN · Heimasíða: http://www.umms.fo
TEL. INT. +298 35 50 50 • FAKS INT. +298 35 50 55 • E-MAIL: UMMS@UMMS.FO